# er ikki føroyskur



*Her er sukurtarin avmyndaður vaksandi á einum togi, sum hongur niður úr eini boyðu*

variatión av tarum, ið er tengd at bæði árstíðini og umhvørvinum, sum tarin livir í, hevur hetta bert verið enn truplari.



*Sukurtari við sínum eyðkenda rukkuta og avlanga blaðið liggur á turrum, meðan tað fjarðar – ein heldur óvanlig sjón*

Man veit t.d. at Laminaria-tarasløg, sum eru útsett fyri nógvari aldu, hava nógv styttri stelk, enn hvat teir vanliga hava, tá tarin er í einum meira vardum øki. Blaðið er ofta eisini smalri og tjykkri, og stelkurin meira hulin, har tað er aldubart.

Morfologisk variatión er eitt rættuliga kent fyrbrigdi í lívfrøðini, og tað eru nógvir ymiskir faktorar, ið gera tað trupult at seta tvær strikur undir úrslitið.

Sukurtarin, og tískil eisini Føroyatarin, livir best í einum økið, har rákið ikki er ov stórt, og streymurin ikki ov harður. Vanliga sigur man, at teir finnast á 3 til 15 metra dýpið í vardum til miðal aldubardum økjum.

## Krossing

Tá tað finst so stór variatión millum Laminaria-sløgini, eru fleiri royndir gjørdar, har man hevur krossað tarasløgini. Hetta fyri at vissa, at talan ikki er um krossparing millum sløgini. Tað hevur eyðnast at fingið livandi tara í hesum royndum. Men allir hesir tararnir hava verið sterilir, og kunnu tískil ikki roknast sum eitt millumlið millum artirnar. Eitt slag verður allýst sum ein bólkur av verum, ið kunnu parast við hvørjum øðrum og fáa fruktagott avkom.

Man helt annars, at hetta kundi verið støðan hjá føroyska taranum. Men so var ikki.

Tann føroyski tarin, sum Fredrik Børgesen fann í Føroyum í 1896 er seinni eisini funnin í Íslandi. Og við hesum verður allur ivi um tann serføroyska tara staðfestur og vísur, at tað skulu bert nakrir serligir umhvørvisfaktorar vera tilstaðar fyri at finna hesa variatiónina av sukurtaranum.

## Fakta: Tari – sera ólík syskinabørn

Tari er bólkaður saman algum við í evolutionera lívs ættartrænum. Algur og tari eru ikki ein monofyletisk eind, t.v.s. at tey eru ikki ættaði úr somu grein í fylogenetiskaættartrænum.
Fylogenetikkur er ættargransking millum ymiskar bólkar av verum (t.d. slag). Hetta verður gjørt við ílegugranskingar úrslitum og morfologiskum útgreiningum.
Tarar hava eins og blómuplanturnar á landi evnir at ljóssamevna. Men tarar kunnu ikki samanberast við plantur, tí teir hava ikki rót, legg og blað, sum blómuplanturnar hava. Eisini víkur formeringin hjá tarum heilt frá formeringini hjá blómuplantunum. Harafturat taka tararnir ikki tøðevnir úr jørðini.
Tari er oftast festur í steinar ella hellubotn, og tískil upptekur tarin tøðevnir beinleiðis úr sjónum.
Tari hevur festi, stelk og blað. Festið syrgir fyri, at tarin situr fastur. Stelkurin, sum er elastiskur og sterkur, ansar eftir, at tarin ikki verður skræddur leysur av aldum, meðan blaðið upptekur tøðevnir.




*Fylogenetiska lívstræðið. Tararnir eru markeraðir við svørtum*